# ...ar niður

**FAKTA UM DYSTIN**

**Stjørnan-Neistin 14-18 (9-10)**
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Alina Olaru 6 (4), Joan M. Djordjevic 5(1), Bára Skaale Klakstein 1, Anna Kristian Samson 1, Una Olsen 1
**Neistin:** Nicoleta Radu Hansen 8(3), Ása á Neystabø 3, Katrin á Neystabø 2, Annika Thomsen 2, Mildrið Jacobsen 1, Birita Wardum 1, Unn Kragesteen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 7, Neistin 5
**Útvísingar:** Stjørnan 6, Neistin 8
**Diskvalifikatión:** Stjørnan 1 (3X2 minuttir)
**Dómarar:** Heri Petersen & Dánjal Samuelsen. Høvdu sum so eina greiða linju, men tóktust í løtum mest sum ov spentir upp á uppgávuna. Nakað sum eitt nú gjørdist sjónligt, tá teir fleiri ferðir bríkslaðu ov tíðliga, heldur enn at lata fyrimunsregluna galda.

seinasta korterið staðfestir eisini málmansavrikið.

Týdningarmesta bjargingin av øllum var kanska tann, sum hon hevði einar tríggjar minuttir fyri leiklok. Við tveimum misnýttum brotskøstum hevði Neistin ikki tikið av, tá tær eitt skifti vóru tvær í yvirtali, og nú hevði Stjørnan feingið ein seinasta møguleika. Tað eydnaðist teimum eisini at spæla Neista-verjuna tunna, men meira enn tað sama hendi ikki. Einar tvær ferðir sparkaði Manu bara bóltarnar upp undir loftið, tá leysar mótstøðukvinnur royndu seg. Og tá fyrst Ása á Neystabø og síðani Mildrið Jacobsen sendu seinastu bóltarnar í kassan, var leyst og liðugt. Bláa fjøldin kundu tysja á vøllin, tá seinasta ýlið ljóðaði. Fyri fyrstu ferð í átta ár kom eitt gullmerki aftur til Neista-kvinnurnar.

### Deydligur bonkur

Hjá Stjørnuni var vónbrotið sjálvandi stórt, nú tað ikki eydnaðist at taka steypið til ognar, soleiðis sum tær høvdu sett sær fyri.

Tað skal einki takast frá stríðsviljanum og liðavrikinum hjá Neistanum. Og serstakliga fantastiska málmansavrikið frá Manuelu. Men samstundis var tað eisini merkisvert, hvussu fá vápn Stjørnan hevði at venda gongdini við.

Fyrst og fremst, so fullu vantandi útskiftingarnar í eygað. Tað vóru mest sum somu spælarar, sum spældu allar 60 minuttirnar, og tá er avmarkað, hvussu nógv nýggj hugskot kundu koma inn á vøllin. Kanska skal tað ikki lítast blaðungum spælarum upp í hendi at venda dystinum. Men vórðu hesar nýttar í størri mun, so kundi tað givið teimum meira royndu nakað meira av hvíld og nakað minni av frustratiónum. Seinastu løtuna stóð í øllum førum greitt, at krútið var uppi. Enn ikki við seks móti fýra megnaðu tær veruliga at skræða Neista-verjuna sundur.



### FM-spenningur

Eitt er, at Neistin nú er steypavinnari. Annað er, at FM-spenningurin nú tykist vera nakað nógv størri, enn hann áður hevur verið í ár. Frá flestu síðum hevur alla tíðina verið roknað við, at Stjørnan eigur sterkasta liðið.

Tað hava tær kanska eisini, men styrkin er ikki størri enn so, at eisini tær kunnu takast. Hvørt talan bara var um ein einstakan kiksara, ella um finalan sýndi tekin um eitt valdsskifti, er enn ov tíðliga at siga nakað um. Ein ábending fæst tó longu komandi vikuskifti. Tá skal Stjørnan á heimavølli taka ímóti nýklaktu steypavinnarunum úr Neistanum, og hesa ferð er favoritt-leikluturin í øllum førum ikki eins greiður.

# Vit vildu vinna

**Smílið var stórt, tá Kára á Dunga sum liðskipari skuldi upp eftir fyrsta steypinum til Neista-kvinnurnar í átta ár**

VINNARI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Ein góð verja, ótrúligt málmansspæl og stríðsvilji. Tað var uppskriftin hjá Neista-kvinnunum, sum nú aftur eru á toppinum*

Mynd: Álvur

Fagnaðurin var øgiligur, tá seinastu sekundini av kvinnufinaluni vóru farin. Blái herurin av áskoðarum tusti inn á vøllin, og meðan væl kendu Queen tónarnir rungaðu í høllini, tóktust Neista-kvinnurnar bara njóta løtuna. Fyri fyrstu ferð síðani 1998 hevði liðið aftur gullmerki um hálsin.

Og tað var sjálvandi ein bæði fegin og errin Kára á Dunga, sum vit fingu orðið á, beint áðrenn hon skuldi á pallin eftir steypinum.

– Vit søgdu tað við okkum sjálvar, at í dag skuldi tað henda. Stjørnan skuldi ikki sleppa avstað við steypinum aftur í ár. Og tí kempaður vit so fyri allar 60 minuttirnar.

Hvør var orsøkin til, at tað loksins eydnaðist tykkum at basa Stjørnuni?

– Verjan. Fyrst og fremst verjan, og so tað, at vit trúðu upp á møguleikan. Og so sjálvandi eisini Manu. Hon spælir ein fantastiskan dyst, har hon pilkar alt sjálvsálitið úr spælarunum hjá teimum. Spælið hjá okkum er kanska ikki nakað at reypa av, og bæði liðini gera hópin av teknískum feilum. Men vit royna alla tíðina at halda fast, og tað ger munin at enda.

Og so var annars lagt upp til veitslu hjá Neistanum. Felagið fyllir nú 75 ár, og tað skuldi sjálvandi markerast við manér.

– Vit skulu bara hugna okkum. Nú eru vit endiliga á toppinum aftur, og tað skal feirast, segði ein stórsmílandi Kára, áðrenn hon fór á pallin eftir steypinum, sum nú loksins aftur verður at finna í Neista-hølunum.

# Tað skuldi haldast

**Við einum avriki, sum nærum kann tryggja henni heitið sum ársins spælari, var Manuela Stan Jensen størsti vinnarin av øllum leygardagin**

VINNARI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Manuela Stan hevði sum so ongar ætlanir um at spæla hondbólt aftur í ár. At hon so kortini valdi at taka eitt ár afturat, munnu tey í Neistanum stórliga fagnast um*

Mynd: Álvur

Tað var eingin ivi um, hvør var stóri spælarin í kvinnufinaluni. Manuela Stan Jensen hevði við framúrskarandi málmansspæli hildið Stjørnuni burtur frá stóra steypinum, og eingin ivi um, at tað var hana, sum miðlarnir vildu hava orðið á eftir dystin.

Sjálv hevði Manu tó ikki tann stóra hugin at gera nógv burtur úr sær sjálvari. Men eftir at hava fingið ein lufttúr frá liðfeløgunum, mátti nakað av tíð setast av kortini.

Fáorðað greiiddi hon frá, at hon sjálvandi var fegin um sigurin.

– Vit trúu uppá, at hetta skuldi lata seg gera, og vit stríddust alla tíðina fyri hesum.

Men tað sá tó svart út til tíðir. Hvat hugsaði tú, tá tit bara tríggjar minuttir fyri dystarlok vórðu skerdar við tveimum spælarum?

– Eg hati at tapa. Og tí kundu vit ikki missa takið so seint í dystinum. Tað mátti bara ikki henda, so vit máttu bara allar stríðast enn meira. Og tað riggaði tíbetur, segði ein flennandi málverji at enda.